# Fingu ein smakk av hi

**Sunnudagin fór eldrasambýlið Oman Hoydalar á útferð til Æðuvíkar.**
**- Um himmiríkið er bara ein dropi av Æðuvík, so gleði eg meg at koma har upp, sigur Signhild Danielsen, sum er eitt av teimum níggju búfólkunum, sum elskar at búgva í sambýlinum Oman Hoydalar 6**

Á veggunum hanga fínir smáir málningar, sum tey gomlu sjálvi hava málað. Herfyri bakaðu tey smákøkur og gjørdu konfekt, og tá slaktið var í heyst, var lagamanni at seyma indur.

- Hetta er teirra heim, og tí skal tað vera trygt, fjálgt og hugnaligt, sigur leiðarin Tórhild Jacobsen, og peikar runt á allar tær vøkru jóladekoratiónirnar, sum tey gomlu hava verið við til at gera, og pyntið, sum tey sjálvandi eisini hava verið við til at heingja upp.

Og starvsfólkini siga við ein munn, at alt broyttist til tað betra, tá ið Tórhild gjørdist leiðari í august, og at stovnurin er ikki at kenna aftur, so hugnaligur er hann vorðin síðani. Fyrr var ongin leiðari á sjálvum stovninum, tí leiðslan sat niðri í býnum.

Eitt starvsfólk tekur soleiðis til: Fólk hoyra bara um, hvussu ringt tey gomlu hava tað. Her hava bæði tey og vit tað ordiliga gott, umstøðurnar eru fínar og tey fáa bæði umsorgan, upplivingar og kærleika.

Og øll tey gomlu, sum vit práta við hendan vakra mánadagin í desember, siga tað sama. Men tey høvdu ikki nýtst at siga tað, tí, í somu løtu vit seta fótin inn um úthurðina, kemur ein góður andi okkum í møti. Ein kensla, sum situr í veggunum, og sum talar sítt týðuliga mál: jú, her er gott at vera.

Tá vit, eg og myndamaðurin, stinga høvdið inn um hurðina í stovuni sita tey klár og bíða eftir Sosialinum. Úthvíld eftir middag, eitt sindur spent, við perlubondum, skóleistum og so avbera tíðindafróð. Millum stólabeinini melur ein fittur hvítur hundur, sum øll eru so góð við, og millum tvey vindeygu stendur stórt fuglabúr við húsfuglinum, sum eisini vil hava orðið, ella pippið, av og á.

- Halló, sigi eg nokkso hart, havandi í huga, at oyrini helst eru farin at bila hjá hesum gomlu, við einum miðalaldri umleið tey níti. Og tey flestu nikka, heilsa og smílast, tí nú komu vit endiliga.

- Hvussu hava tit tað her, hálvavegna rópi eg, eftir at hava greitt frá, hvør eg eri, og hví eg komi dragsandi niðan til Hoyvíkar við penni, blokki og myndamanni í hølunum. – Av hundunum til, letur í einari gamlari gellu, og so er ísurin brotin, øll bresta út úr at flenna, og næstu tímarnar fáa vit eitt gott prát við hesi gomlu fólkini, sum vóru á útferð til Æðuvíkar í gjár.

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Hilda fer altíð at vera sjúkrasystur. Hon og Jona, sum situr her við hundinum, hava arbeitt saman á Landssjúkrahúsinum í nógv ár.*
*- Onkuntíð hyggur hon eftir, um vit gera okkara arbeiði nóg gott, og hon ansar so serstakliga væl eftir perluvinkonuni Jonu Joensen, sum er dement og onki kann sjálv, sigur Jeanni, sum arbeiðir á sambýlinum*



*Signhild Danielsen er ein sera prátingarsom eldri dama.*
*- Her er alletiders at vera. Super. Øll kappast um at fáa pláss her, tí tað er so gott, sigur Signhild, sum var við á útferð til Æðuvíkar í gjár.*
*- Æðuvík var nakað so bedárandi, og eg kendi tað, sum eg fekk ein smakk av himlinum, sum eg ímyndi mær hann – hirðarnar, einglarnar og alt so strálandi og fínt, sigur Signhild. Hon hevur verið einkja í eitt ár eftir mannin Petur Danielsen, ella Petur á Hvítanesi. Tey vóru gift í heili 70 ár.*
*- Vit vóru gift so leingi, at vit høvdu bæði jarn og stál. Og eg má siga, at eg var heppin, tí hann var altíð so fittur og kjerligur og segði góða í hvørjum setningi. So tað er næstan ikki til at bera, at eg havi mist hann, sigur Signhild, sum eisini heldur hetta vera orsøkina til, at hon púra hevur mist matarlystin, hóast maturin er avbera góður.*
*- Maður mín búði eisini her á sambýlinum. Men tíbetur havi eg Jesus sum besta vin, tí mær dámar so ómetaliga væl alt sum hevur við tað andaliga at gera, sigur Signhild, sum eisini er so glað fyri, at verdóttirin arbeiðir í Sambýlinum.*
*- Ja, hon er ein sannur eingil, sigur Signhild.*

